KLAKSVÍKAR BÓKASAVN

## FRÁ KLAKSVÍKAR BÓKASAVNI

Á Klaksvíkar bókasavni er eitt starv sum hjálparfólk leyst at søkja.

Skikkaður umsøkjari er til starvið.

Arbeiðstíðin er ¾ tíð.

**Starvsøkið fevnir um tað dagliga arbeiði á bókasavinum so sum:**

- skráseting
- arbeiði í avgreiðsluni
- annað fyrifallandi arbeiði

**Søkt verður eftir persóni:**

- við kunnleika til nýtslu av EDV
- ið dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- ið er ágrítin og fyrikomandi

Setanarviðurskifti: Starvið verður at seta 1. desember 2008. Løn sambart sáttmála við Starvsmannafelagið.

Umsókn verður at senda til:
Klaksvíkar bókasavn
Postboks 45
FO-700 Klaksvík

Í seinasta lagi 10. oktober 2008

Fleiri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til:

Anniku Egholm, býarbókavørð
TLF. 45 57 57

Klaksvíkar kommuna

## Bátur til sølu

6 mannafar til sølu, við fiskiloyvi, sum krevur ábøtur.

Kostnaður 10.000,00 kr.

**Ring á tel. 218240**

Bíliga til sølu



## Renault Laguna til sølu

Bilurin er frá desember 1998. Hevur fløguspælara og el-rútar. Bilurin er enskur, men er skrásettur í Føroyum og er góður at koyra.

Verður seldur **SERA BÍLIGA** vegna flyting.

**Áhugaði kunnu ringja á tel. 222081**

EYSTURSKÚLIN TÓRSHAVN

# Lærarastarv í Eysturskúlanum

Eysturskúlin søkir eftir lærara í tíðaravmarkað starv fyri lærara í barnsburðarfarloyvi at byrja sum skjótast og skúlaárið út.

Viðkomandi verður flokslærari í 2. flokki og undirvísir burturav í innskúlingini.

Starvið eru lønt í lønarflokkunum 18.1 –29.2 sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið

**Í Eysturskúlanum leggja vit dent á:**

- Í undirvísingini at taka støði í teimum mongu førleikunum
- At leita eftir sterkum síðum hjá næminginum
- At tollyndi skal verða grundleggjandi fyri alt okkara virksemi

**Søkt verður eftir lærara sum:**

- hevur lærarаútbúgving
- dugir væl at samstarva og samskifta
- áhaldandi vil menna seg sjálvan og skúlan
- ikki ræðist nýggjar avbjóðingar
- setir tollyndi í hásætið

**Umsóknir:**
Umsóknir við avriti av prógvi, CV og møguligum viðmælum skulu verða skúlanum í hendi í seinasta lagi týsdagin 1. oktober 2008.

Meira fæst at vita um størvið við at seta seg í samband við skúlastjóran, Eyðdis Eidesgaard á

tlf. 302540/214752 ella varastjóran Jógvan Martin Mørk tlf. 302540/214753

**Eysturskúlin**
**Tórgarðsgøta 17**
**100 Tórshavn**

Í Eysturskúlanum eru 491 næmingar í 1. til 10. flokki og uml. 50 lærarar. Skúlin er skipaður í sjálvstøðug toymi. Meginreglan er, at lærarar arbeiða í einum toymi burturav. Í hvørjum toymi eru 4-5 flokkar.

# Frá Sláturmiðstøðini í Haraldssundi

Nú er flettingartíð. Um tú ikki hevur tíð og orku, so fletta vit fyri teg og vit hava eisini neyðuga flutningsbilin.

Skjótt og væl úr hondum greitt.

Eisini selja vit fesk og røst krov.

**Ring: 21 67 47 ella 28 67 87.**

**Sláturmiðstøðin**

***...altíð ein tumma frammanfyri***

FJØRUVEGUR 1 · 785 HARALDSSUND

Sosialurin -har tað hendir

Fiski- og tilfeingismálaráðið

FISKIVINNU GRANSKING

## Fiskivinnuroyndir 2009 Lýsing eftir umsóknum

Fiskivinnuroyndir er játtan hjá Fiski- og tilfeingismálaráðnum, sum stuðlar royndir og kanningar – bæði praktiskar, vinnuligar og vísindaligar, ið menna og økja um framleiðni í føroyskari fiskivinnu við atliti at lívfrøðiligari, búskaparligari og samfelagsligari burðardyggari gagnnýtslu av havtilfanginum

**Verkætlanir, sum stuðul kann søkjast til, eru skipaðar í trý høvuðsøki:**

- Burðardyggur fiskiskapur
- Royndarveiða og virðisøking av fiski
- Búskaparlig og samfelagslig menning av fiskivinnuni

Innanfyri høvuðsøkini verður í ár lagdur dentur á at fáa verkætlanir, sum kunnu hava orkusparing við sær.

**Serligur dentur verður lagdur á, at:**

- vinnan tekur lut í verkætlanini
- eginfígging ella onnur fígging er
- samstarv er við samstarvsfelagar í Føroyum (almennar og/ella privatar) og/ella uttanlands.
- at verkætlanin er skipað við einum stýrisbólki at fylgja við gongdini

Fyritøkur, almennir stovnar og einstaklingar kunnu søkja um stuðul úr Fiskivinnuroyndum.

Víst verður á, at møguleiki eisini er hjá vinnuni at søkja um stuðul til setan av vinnugranskara innanfyri omanfyrinevndu økir við fígging upp til 50%[1].

Um tørvur er á at orða hugskot til ítøkiligar verkætlanir ber til at seta seg í samband við samskiparan um hetta.

Umsóknir skulu verða samskiparanum í fiskivinnugransking í hendi í seinasta lagi mikudagin 15. okt. 2008, kl. 12:00

**Meira fæst at vita:**
Programm, umsóknarbløð, vegleiðingar og annað kunnandi tilfar fæst á heimasíðu okkara www.fvg.fo

Áhugaði eru vælkomin at venda sær til Jákup Mørkøre, samskipara við møguligum spurningum.

Fyrivarni verður tikið fyri játtan á løgtingsins fíggjarlóg fyri 2009.

**Jákup Mørkøre, samskipari**
tlf.: 35 30 30 / 35 32 48
fartel: 55 32 48 (fyrr 21 73 69)
t-post: jakupmo@fisk.fo

**Umsóknir skulu sendast til:**
Fiski- og tilfeingismálaráðið
Samskiparin í fiskivinnugransking
P.O.Box 347
Heykavegur 6A
FO-110 Tórshavn

[1] max. 300 kkr./ár í 3 ár